


Til Cafe A í handilshúsinum Miðlon í havn, sóknast vit eftir fólki at arbeiða fyrrapartar.

Ynskiligt er at viðkomandi er røsk/ur, álítandi og smílandi.

Hevur hetta tín áhuga, hevði tað glett okkum at hoyrt frá tær á tel 221990.

Cafe A

Hoyvíksvegur 67 - 100 Tórshavn - tel 321991

# Pakkifólk søkist



Heimabakaríið í Sørvági søkir eftir pakkifólki at byrka skjótast gjørligt.

**Áhugaði kunnu ringja til Nancy á tlf. 33 30 14 ella 27 22 73**

**Heimabakaríið**

# Lærlingur søkist



Heimabakaríið í Sørvági søkir eftir lærlingi at byrka skjótast gjørligt.

**Áhugaði kunnu ringja til Jón Suna á tlf. 33 30 14 ella 59 61 60**

**Heimabakaríið**

## Fólk til TelduTænastuna !

**Søkt verður eftir einum dugnaligum KT-fólki til handil / verkstað okkara.**

**Førleikakrøv**
Vit ynskja at tú hevur royndir ella eina viðkomandi útbúgving innan KT-arbeiðið / sølu.
Dentur verður lagdur á, at tú ert "sølumindaður" hevur stóran áhuga í teldum og annars hevur góð samstarvsevnir, ert fyrikomandi og kanst arbeiða sjálvstøðugt.

**Starvið**
Vit kunnu bjóða eitt áhugavert og spennandi starv innanfyri sølu á einum øki við stórari framgongd.
Tætt samstarv verður við verkstaðið har tú fart eitt stórt innlit í teldum og hardware.

**Umsókn**
Umsóknir, saman við prógvum/viðmælum skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 12.08.2006.
Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Steffen Solberg á tlf. 219280.

**TelduTænastan**
**Staravegur 5**
**Postbox 1144**
**FO-110 Tórshavn**

SPF Teldu Tænastan

Telefon: 317620 • Telefax: 317699 • Heimasíða: www.tt.fo

# Leiðari til dagstovnin Látipípuna

Hervið verður søkt eftir leiðara til dagstovnin Látipípuna hjá Vestmanna Kommunu.
Stovnurin er normeraður til 22 børn í útibarnagarði og til børn úr 1. og 2. flokki í frítíðarstovu.

Leiðarin skal hava námsfrøðiliga útbúgving, og starvið verður sett frá í seinasta lagi 1. oktober 2006 at rokna.

Dámar tær væl at skipa fyri og at vera úti í náttúrini, er hetta møguliga nakað fyri teg!

Lønin er sambært sáttmála ímillum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Pedagog–felag.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Maluna Stórá á Dagstovninum Látipípuni, tlf. 470146 ella 230145.

Umsókn saman við avriti av prógvi og møguligum um mælum skal verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta laagi 21. august 2006, kl. 12.00.

Vestmanna Kommuna

# Møtlar

Vit seyma møtlar og hava nakrar á goymslu.

**Krista Poulsen**

Tlf. 424599, 215599 ella 217599

## KRAMBAFÓLK

Til Bakaríið í miðbýnum og Statoilstøðini á Argjum verður søkt eftir fyrikomandi og røskum

**krambafólki**

til skiftandi vaktir.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja til Bárður Olsen á tlf. 21 53 87 millum kl. 15:00 og 18:00.

**P/f Vørður**
Hoyvíksvegur 65
Postboks 1048
110 Tórshavn

# Lærarastørv

## í Fuglafjarðar skúla

Hesi tíðaravmarkaðu størv verða lýst leys til setanar:

**Starv 1**
- **1 lærari í tíðaravmarkað parttíðarstarv (uml. 0,7) frá 14. august til 19. desember 2006**
  fyri lærara í barnsburðarfarloyvi

**Starv 2**
- **1 lærari í tíðaravmarkað parttíðarstarv (uml. 0,7) frá 14. august til 6. oktober 2006**
  fyri lærara í barnsburðarfarloyvi

**Starv 3**
- **1 lærari í tíðaravmarkað starv frá 16. oktober 2006 til umleið 5. mai 2007**
  fyri lærara í barnsburðarfarloyvi

**Stórur møguleiki er fyri, at sami persónur verður settur í starv 2 og 3**

**Søkt verður eftir lærarum, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- eru stundisligir og nærlagdir

**Harafturat skulu lærararnir kunna átaka sær hesar tímatalvur:**
***Starv 1:*** **Flokslærari í 4. a, 4. a í náttúru/tøkni, tilevning og føroyskum, 8. abc í lívfrøði og 8. b í kristnikunnleika**
***Starv 2:*** **Floksærari í 9. c, 9. c í føroyskum, 5.6. í tilevning og heimkunnleika. Eisini eru 9 t/v í bókasavnsarbeiði**
***Starv 3:*** **Flokslærari í 4. b, 4. b í støddfrøði, náttutu/tøkni, kristnikunnleika og tilevning, 3. b. í tilevning og 8. 9. 10. fl í handarbeiði**

**Førleikakrøv:**
Læraraútbúgving og linjulestnaður ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og ljósriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlanum í hendi **í seinasta lagi hósdagin 3. august kl. 10.**

Nærri kunning um størvini fæst við at ringja til Súna í Hjøllum, skúlastjóra, á tlf. 214087. Eisini ber til at senda teldupost til skúlastjóran: suni@ffs.fo

**Fuglafjarðar skúli**
Postboks 9
FO-530 Fuglafjørður

Fuglafjarðar skúli hevur komandi skúlaár umleið 335 næmingar í 19 flokkum. Við skúlan fara at starvast 34 lærarar, 1 stuðul, 1 húsavørður og 4-5 reingerðingarfólk. Áhugað kunnu lesa meira um skúlan á heimasíðuni: www.ffs.fo

Lesið Sosialin - so eru tit við